# í kjallaran



*– Eg kom so langt út, at eg setti spurnartekin við um hetta lívið mundi vera vert at liva, sigur Ovin Klein Olsen*

## Fløgu til góðgerandi endamál

*Hóast Ovin Klein Olsen hevur úr at gera við sangframførslum sínum, hevur hann eisini sett sær eina aðra verkætlan fyri. Hetta er at seta løg til sangir sum Hjørleif Gaard í Kollafirði og Kjartan Stakksund á Eiði hava gjørt. Alt skal eftir ætlan síðani gevast út, fyri at fáa eitt fíggjarligt støði at standa á til eina víðari ætlan við øðrum fløguútgávum og stuðli til góðgerandi endamál, t.d. felagsskapum sum Heimamissiónin, Åpne Dører og onnur. Í hesum sambandi er gjørt eitt serstakt stuðulsskjal, har tær nærri treytirnar við stuðlinum eru festar á blað.*

at skriva sangir um støðuna hjá mær.

– Hetta hjálpti mær, tá eg var longst niðri, sigur Ovin, sum kann fegnast um at fløga hansara hevur fingið góða móttøku í Danmark.

**150 km/t**

Á fløguni eru 14 sangir sum hann nú ynskir at luta saman við øðrum. Hvør einasti sangur hevur sína søgu, sum hevur hjálpt honum í teirri ávísu støðuni.

– Sangirnir eru skrivaðir við einum einasta endamáli: At fáa onnur at hugsa eitt sindur meiri um lívið og ikki koyra avstað við 150 km/t. Júst hetta evnið snýr tann eini sangurin seg um – hetta at hugsa um lívið á lívsins vegi, sigur Ovin Klein Olsen.

Hann ynskir tí fegin at koma út til onnur at siga frá sangum sínum og framføra teir. Tí, sum hann sigur: - Um eg bert fekk ein einstakan persón at hugsa meiri um seg sjálvan, sítt egna lív og sína egnu familju, so var tað ikki til fánýtis. Hann vendir sær eisini til manligu lurtarar sínar, og sum hava trupult við at lurta eftir ávaringunum, sum kroppurin og umhvørvið senda teimum.

– Hetta hevði eg eisini trupult við, og tí siti eg í dag sum ein "kvart grønsag", sum hann brosandi tekur til.

*snorri@sosialurin.fo*

